Strandferðslan sóknast eftir

# Skrivstovufólki

Av tí at skrivstovufólk okkara á Samferðsludeildini hevur sagt upp og fer í annað starv, verður hetta skrivstovutarvið – sum er eitt hálvtíðarstarv - hervið lýst leyst at seta skjótast gjørligt

sansir.fo

**Starvið**
Tú kemur at hava umsitingarligu uppgávurnar á deildini um hendi, og tað inniber m.a. at umsita:

- sáttmálaavrokningar á Bygdaleiðum
- faktureringar av ymsum flutningstænastum
- skúlakort og onnur elektronisk kort og Buscom-modulir
- journalisering og búnar
- skrivarauppgávur og aðrar fyrifallandi uppgávur

**Førleikakrøv**
Vit rokna við:

- at tú hevur hóskandi útbúgving, tvs HH-, skrivstovu- ella líknandi útbúgving og royndir
- at tú hevur edv-kunnleika á brúkarastigi
- at tú ert ágrýtin og fleksibul og hevur góðan røkjuskap
- at tú hevur góð samstarvsevni og góðan tænastuhugburð
- at tú orðar teg væl bæði munnliga og skrivliga

**Setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggarmálaráðið og Starvsmannafelagið, og verður lønt við lønarbrøkinum 0,5 í lønarflokki 2. Arbeiðsstaðurin er í løtuni Yviri við Strond 4 í Tórshavn. Frá 1. januar 2008 er arbeiðsstaðurin á Tvøroyri.

**Umsóknir**
Umsókn við próvskjølum og møgulig-um viðmælum skal sendast til:
Strandfaraskip Landsins
stílað: Starvsfólkadeildin
Postboks 88
FO-110 Tórshavn

og skal vera fyritøkuni í hendi í seinasta lagi hósdagin 19. apríl 2007, kl. 12.00.

Til ber eisini at senda umsóknina til t-post: pah@ssl.fo

Vinarliga ring til Andrass Jensen, samferðsluleiðara á tlf. 343081 ella t-post: anj@ssl.fo, um tú ynskir nærri upplýsingar.

Strandfaraskip Landins (SSL) eru landsfyritøka undir Innlendismálaráðnum, hvørs endamál er at nøkta landsins tørv á innanlands fólka- og farmaflutningi. Fyritøkan umsitur 29 farleiðir: 22 Bygdaleiðir og 7 Oyggjaleiðir. Samlaða talið av ferðafólkum við SSL í 2006 var 1,1 millión: 620 túsund við bussunum og 480 túsund við ferjunum. Talið av flutningsanleggum er 40 bussar, 8 ferjur og farmaflutningsútbúnaður. Starvsfólkini eru á leið 170 í tali, svarandi til 120 ársverk. Fyrisitingin á SSL er skipað í fimm deildir: Samferðslu-, Rakstrar-, Fíggjar-, Starvsfólka-, Farma- og cateringdeild.

STRANDFARASKIP LANDSINS



# TIL SØLU

**1 SCANIA 124C 8X4** árg. 98, koyrt 136.000 km
í sera góðum standi

**1 SCANIA 113H 6X2** árg. 90, koyrt 150.000 km
í góðum standi

Bilarnir eru til sølu um hóskandi boð fæst,
og kunnu síggjast og roynast í Klaksvík.

**Sp/f Grevstur**
**Tlf. 505111**




**Skírhósdagin 5. apríl** verður flogið sum fríggjadag
**Langa fríggjadag 6. apríl** er eingin flúgving
**Leygardagin 7. apríl** er eingin flúgving
**1. Páskadag 8. apríl** er eingin flúgving
**2. Páskadag 9. apríl** verður flogið sum mikudag

Tel 34 10 60 · Faks 34 10 01 ATLANTIC HELICOPTERS atlantic.fo

